## La Liga er best



Xavi, sum hevur sýnt stórspæl á miðvøllinum hjá Barcelona í ár, sigur seg ikki vera í iva um, at spanska La Liga er ein sterkari fótbóltsdeild enn enska Premier League. – Eg veit væl, at støðið er høgt í Premier League, men eg haldi kortini, at tað er enn hægri hjá okkum. Tekniskt eru vit betri, meðan bretsku liðini kanska eru skjótari og sterkari, segði Xavi á tíðindafundi undan dystinum á Camp Nou í kvøld, har Barcelona tekur ímóti Chelsea.

## Chelsea vil steðga Messi

Í kvøld klokkan 19.45 spæla Barcelona og Chelsea fyrru hálvfinaluna í Champions League kappingini, og undan dystinum verður nógv tosað um, hvussu Chelsea skal steðga Lionel Messi, sum í løtuni verður roknaður sum kanska besti spælarin í heiminum. Vanligi vinstri bakkurin, Ashley Cole, er leikbannaður, og Wayne Bridges, sum hevur verið eykamaður, varð í vetur seldur til Manchester City. Tí verður roknað við, at José Bosingwa fær ótakksama leiklutin at verja fyri Lionel Messi. Dysturin millum Barcelona og Chelsea sæst beinleiðis á 3+.

# Sigrun Smith stóra vónin hjá badminton

### Badminton-spælararnir

Sigrun Smith
Gurið Poulsen
Brynhild Carlsson
Rannvá Carlsson
Aksel Poulsen
Absalon Eysturoy
Rógvi Poulsen
Magnus Gaard
Niclas Eysturoy

**Hon vann gull á alternativu leikunum í Grønlandi í 2007, sum vóru, tí badminton ikki var við á Oyggjaleikunum. Spurningurin er, um hon kann hála hinar spælararnar upp við sær, so væl fæst burturúr á Álandi eisini**

BADMINTON
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tá FM-kappingarnar hjá teimum vaksnu vóru herfyri, var tað ein væl uppløgd Sigrun Smith, sum vann meistaraheitið í einmansleiki hjá kvinnum. Og nú badmintonspælararnir til Oyggjaleikirnar á Álandi eru úttiknir, eigur hon sítt sjálvsagda pláss millum tey níggju, sum fara avstað.

Heldur ikki skerst burturúr, at Sigrun er ein góður trumfur at hava, tí longu í 2007 vísti hon, hvør dugur er í henni, tá hon vann gull í einmansleiki á alternativu leikunum, sum vóru í Grønlandi, tí badminton ikki var við á Rhodos. Tí eru sjálvsagt eisini stórar vónir settar til hana hesa ferð.



Men tað er ikki bara Sigrun, ið kann gera ein vørr í Álandi í summar, tí um vit framvegis halda okkum til tað, sum hendi fyri tveimum árum síðani, so vunnu Føroyar silvur í liðkappingini, umframt onnur heiðursmerki.

Tí er einki at siga til, at tað er við einum ávísum bjartskygni, at badmintonfólkini venja av øllum alvi komandi tveir mánaðirnar. Og spælararnir, talan er um, eru ein góð blanding, ið gongur heilt niður í 14 ára aldur og upp í endan á 30-unum, so her er ein ávís breidd at síggja.

### Leggja nógv fyri

Á kvinnusíðuni er talan fyrst og fremst um FM-finalistarnar, Sigrun Smith og Gurið Poulsen, umframt at systrarnar Brynhild og Rannvá Carlsson eru við. Og hjá monnunum eru eisini FM-finalistarnir við, Aksel Poulsen og Absalon Eysturoy, umframt Rógva Poulsen og Magnus Gaard.

Níggjunda navnið á listanum er Niclas Eysturoy, sum tó hevur verið skaddur og eitt nú mátti geva avboð til FM-kappingina. Verður hann ikki klárur, er lítið at ivast í, at spælarar sum Ragnar Rasmussen, Bjartur Lamhauge, Flóvin Mikkelsen, Gunnar Poulsen og aðrir liggja framvið, og óivað halda teir seg klárar, skuldu boð verið eftir teimum.

– Vit vita, hvat Sigrun kann vera før fyri, og so skulu vit heldur ikki gloyma, at Aksel Poulsen, sum vann silvur á Oyggjaleikunum í Hetlandi fyri fýra árum síðani, ikki hevur verið betri enn tað sama, sigur Høgni Carlsson, nevndarlimur í Badmintonsambandinum og liðleiðari, tá farið verður til Álands.

Venjari er Aritra Nandi, sum fær hjálp frá fyrrverandi landsliðsvenjaranum, Tobias Effersøe, so á tí síðuni er liðið væl fyri, tí báðir tveir kenna føroysku spælararnar út og inn.

– Spælararnir ganga høgt upp í tað undir venjingunum, og komandi mánaðirnar er ætlanin at leggja nógv fyri, eitt nú við fyrrapartsvenjingum, sigur Høgni Carlsson.

# Metstórur golfhópur

**Føroyska manningin, sum skal umboða Føroyar í golf á Oyggjaleikunum á Álandi, hevur ongantíð verið størri enn hesa ferð, tí talan er um fimm fólk. Og fyri fyrstu ferð er eisini eitt konufólk við hesa ferð**

GOLF
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Á Rhodos fyri tveimum árum síðani vóru tríggir føroyskir golfspælarar við, men hesa ferð er talið uppaftur hægri, tí fimm hava vunnið sær pláss á golfliðnum, sum fer avstað. Teirra millum er enntá ein kvinna, Finngerð Sólbjørg, sum er úr Klaksvík, men býr í London. Hon hevur forrestin verið við á Oyggjaleikum fyrr, men tá sum flogbóltsspælari.

Rói Christiansen og Jónfinn Thomassen, sum báðir búgva í Danmark og eisini vóru við síðst, eru við aftur hesa ferð, og aftur at teimum eru so eisini Oskar Eiriksson og Janus Norðberg, sum báðir búgva og spæla í Føroyum.

– Hetta er met í luttøku fyri okkara viðkomandi. Úttøkan er farin fram eftir einum styrkilista, har handikappið er avgerandi fyri, hvør sleppur við, sigur Janus Norðberg, sum bæði er spælari og liðleiðari á ferðini til Álands, sum byrjar nakrar dagar undan sjálvum leikunum.

– Tú kanst siga, at vit eru við fyri at læra, tí hetta er bara triðju ferð, føroyskir golfspælarar eru við. Higartil eru vit endað á aftasta plássi, so málið hjá okkum er í fyrsta umfari at sleppa av aftasta plássinum, so vit á tann hátt kunnu fáa eitt betri úrslit enn fyrr.

Janus Norðberg sigur, at føroysku spælararnir fara til Álands nakrar dagar undan leikunum, so teir kunnu venja seg at spæla á vallunum, sum eru til taks. Serliga kann tann venjingin verða kærkomin hjá teimum báðum, sum spæla í Føroyum, tí her eru umstøðurnar ikki av teimum bestu.

Golfkappingin á Oyggjaleikunum gongur yvir fýra dagar, og har eru teir fýra menninir við í bæði liðkappingini og einstaklingakappingini, har úrslitini hjá trimum teimum bestu av teimum fýra verða tald við. Finngerð Sólbjørg er einsamøll kvinna, so hon kemur bara at umboða Føroyar í kvinnukappingini.

Merkisvert er annars, at føroyameistarin og vinnarin av stóru Tórshavn Openkappingini, Ragnar Isaksen, ikki telist millum golfspælararnar, ið sleppa við til Oyggjaleikirnar á Álandi.

### Golfspælararnir

Finngerð Sólbjørg
Rói Christiansen
Jónfinn Thomassen
Oskar Eiriksson
Janus Norðberg



*Máli hjá føroysku golfspælarunum er at sleppa av aftasta plássinum í kappingini*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*